

## Mortan Rasmussen formaður í Eldraráðnum

Nýggja eldraráð Tórshavnar Kommunu hevði sín fyrsta fund mánadagin 12. januar. Forkvinnan, Marita Arge Magnussen, segði seg á fundinum frá sum forkvinnu. Ístaðin bleiv nýggjur formaður Mortan Rasmussen. Marita Arge Magnussen bleiv vald at verða næstforkvinna, og Jákup Lindenskov sum skrivari. Nevndin sær nú soleiðis út: **Nevndarlimir:** Mortan Rasmussen, form. Marita Arge Magnussen, næstforkvinna. Jákup Lindenskov, skrivari. Jóannes Dalsgarð, Gunnvør Joensen. Eykalimir eru: Ása Østerø, Grete Ellingsgaard og Poula Apol. **Tiltakseykalimir eru:** Brynhild Danielsen og Marjun Sigurðsdóttir. Nevndarfundur verður aftur mánadagin 26. januar klokkan 10.

## Bíligari at reka Altingið

Fyri at vísa ein góðan vilja, nú landið er í fíggjarligari trongstøðu, hevur íslendska Altingið samtykt at lækka sínar egnu rakstrarútreiðslur í ár. Í mun til ta upprunaligu játtanina eru 10 prosent skarvað av útreiðslunum. Tað svarar til smáar 10 milliónir krónur í okkara pengum. Sturla Böðvarsson, sum er formaður í Altinginum, sigur við fjølmiðlarnar, at umleið helmingurin av sparingini kemst av, at tingmenn hava samtykt at skerja sína egnu løn. Hitt skal sparast í skrivstovurakstrinum, sigur hann.

# Panikkur í býráðnum í Havn

**Tað er gott, at býráðslimir í Havn hava eina meining um, hvussu tørvurin á ellis-og røktarheimum kann nøktast, men hetta seinasta uppskotið líkist meiri eini panikkloysn, heldur borgarstjórin**

ELLIS-OG RØKTARHEIM
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

- Øll góð hugskot eru vælkomin. Men hetta sær nú meiri út sum um, at tað er eitt sindur av panikki í minnilutanum í Tórshavnar Býráði.

Heðin Mortensen, borgarstjóri í Havn veit ikki ordiliga, hvat hann skal halda um uppskotið frá minnilutanum í býráðnum um, at Tórshavnar Kommuna ognar sær fýra av íbúðarblokkunum Undir Gráasteini og ger teir til ellis- og røktarheim.

Sum tað sæst í hinari greinini her á síðuni, vísur minnilutin á, at tað hevði borið til at útvega eini 80 ellis- og røktarheimspláss í teimum fýra blokkunum.

Heðin Mortensen fegnast um, at minnilutin í býráðnum kemur við ítøkiligum uppskotum um, hvussu ovurhonds stóri tørvurin á ellis-og røktarheimum í Tórshavnar Kommunum, kann verða nøktaður.

- Tað hava vit brúk fyri og hetta er sjálvandi eitt uppskot, sum verður tikið við í viðgerðini, sigur borgarstjórin.

### Sær svart upp á tað

Men í fyrstu syftu dugir hann ikki at ímynda sær, at hetta er ein loysn, sum letur seg gera at fremja, tí hann ivast stórliga í, um tað yvirhøvur ber til at gera íbúðarblokkarnar til ellis- og røktarheim, uttan at tað fer at kosta heilt órímiliga nógv.

Tí heldur hann, at akkurát hetta uppskotið er nakað sveimandi og at tað kanska meiri er ein ábending um, at fjáltur er komin á minnilutan.

- Hetta uppskotið tykist ikki at vera serliga væl gjøgnumhugsað, heldur borgarstjórin.

Hann sigur, at tá ið vit tosa um ellis-og røktarheim hugsa við oftast um bygningar í einari hædd, ella í mesta lagi í tveimum hæddum.

Men her talan um blokkar í fýra hæddum, sum eru bygdir til íbúðir.

- Fyri tað fyrsta hava stórir trupulleikar verið við sjálvari byggingini.

- Men skulu teir brúkast til ellis- og røktarheim, merkir tað, at búfólkið skal flytast upp og niður ímillum fýra hæddir í lyft, umframt at starvsfólk skal flytast upp og niður ímillum fýra hæddir og harafturat eisini ímillum fýra blokkar.

Hann ivast eisini í um lyftir og hurðar eru nóg breiðar til tær sengurnar, sum verða brúktar í ellis- og røktarheimum.

- Og so eru tað brunakrøvini, sum eru ómetaliga strong til ellis- og røktarheim.

Heðin Mortensen sær tiskil fyri sær, at tað fer at verða so dýrt at byggja blokkarnar um til ellis- og røktarheim og at lúka tey krøv, sum setast til slíkar bygningar, at nyttan ikki upp á nakran máta fer at standa mát við kostnaðin.

- Og lúka vit ikki krøvini, fáa vit heldur ikki stuðul frá landinum, hvørki til bygging ella til rakstur, leggur hann afturat.



*Nú er uppskot frammi um at Tórshavnar Kommuna ognar sær fýra av íbúðarblokkunum Undir Gráasteini til ellis- og røktarheim, men tað sær borgarstjórin ógvuliga svart upp á*

# Íbúðarblokkar í Havn gerast til røktarheim

**Minnilutin í Tórshavnar býráði mælir nú býráðnum til at gera fýra av íbúðarblokkunum Undir Gráasteini til ellis- og røktarheim**

ELLIS-OG RØKTARHEIM
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Minnilutin í Tórshavnar Býráð hevur nú sett fram eitt ítøkiligt uppskot um, hvussu tann ovurstóri tørvurin á ellis- og røktarheimum í Suðurstreymoy fyri ein stóran part kann nøktast.

Minnilutin staðfestir at eldraøkið er 100% ein landsuppgáva.

Men Sjúrður Olsen, Annfinn Brekkstein, Vagn Johannsen og Jan Christiansen í minnulutanum í Tórshavnar Býráði, halda kortini ikki at kommunan kann sita hendur í favn, ímeðan eldri fólk í kommununi líða neyð.

Tí mæla teir nú Tórshavnar Býráði til at keypa fýra av íbúðarblokkunum Undir Gráasteini og gera teir til ellis- og røktarheim.

Í tíðindaskrivi í gjárkvøldið siga teir, at hesir fýra blokkarnir kunna gerast um til ellis og røktarheim til eini 80 fólk.

- Hetta merkir eisini at tað verður nógv lættari hjá heimahjálpini at loysa uppgávurnar av tí at so nógvir brúkarar eru savnaðir á sama staði, siga teir.

Teir halda, at tað ber til at gera blokkarnir klárar til endamálið upp á minni enn eitt ár.

Minnilutin hevur eisini spurt seg fyri hjá løgfrøðinginum hjá Føroya Banka, og hann vísti ikki aftur, at tað kundi borið til hjá kommununi at keypt teir fýra bygningarnar til ellis- og røktarheim.

### Langt á mál

Teir fýra býráðslimirnir vísa á, at tað er í Tórshavnar kommunu, at tørvurin á ellis- og røktarheimsplássum er størstur.

Tí halda teir eisini, at landið í nógv størri mun, eigur at verða við til at loysa trupulleikan.

Teir vísa á, at í Tórshavnar Kommunu er ein ætlan um at byggja ellis- og røktarheim yviri við Strond.

Hetta er ein ætlan, sum er mett til at kosta 48 milliónir men har verða bara 24 pláss og tað fara at ganga fleiri ár til tann byggingin er liðug.

Tað er einasta ítøkiliga ætlan, sum er í løtuni á hesum øki, men Heðin Mortensen, borgarstjóri, sigur, at seinni er ætlanin at byggja 24 pláss afturat Yviri við Strond, so at har verða 48 pláss tilsamans.

Samstundis staðfesta Sjúrður Olsen, Annfinn Brekkstein, Vagn Johannsen og Jan Christiansen at tað 130 fólk í kommununi hava bráðneyðugan tørv á at sleppa á ellis- og røktarheim, men av teimum eru tað yvir 70 fólk, sum tað er serliga bráðneyðugt at útvega stovnspláss til.

So tað er langt á mál at nøkta tann tørv, sum er.

Tí heldur minnilutin í Tórshavnar Býráði, at tað rættasta er at útseta ætlanina yviri við Strond og at Tórshavnar Býráð heldur tekur samráðingar upp við landstýrið um at loysa hesa uppgávuna í felag.

- Vit vita at talan ikki er um ta fullkomnu loysnina, men ásannandi stóra tørvin á plássum til eldri, halda vit hetta uppskotið vera eina nýtiliga loysn, siga teir fýra býráðslimirnir.